# Etiskar reglur fyri søvn

## Fororð til føroysku útgávuna

Savns- ella museumsheimurin er samansettur av eini mongd av ymiskum søvnum. Men hóast tey eru ymisk, hava tey nógv í felag. Etisku reglurnar hjá ICOM, sum er ein altjóða felagsskapur undir UNESCO, eru reglur fyri øll søvn í heiminum, sum hava musealt virksemi, og øll, sum arbeiða í tilknýti til søvn við musealum virksemi. Etisku reglurnar hjá ICOM eru tann savnandi tátturin fyri søvn, sama hvar í heiminum tey eru og hvat tey fevna um.

Tær etisku reglurnar hjá ICOM vísa á, hvussu viðurskiftini millum eitt savn, samfelagið tað virkar í og tað einstaka savnstarvsfólkið eiga at vera.

Orsøkin til tær etisku reglurnar er, at søvn við musealum virksemi vegna tað almenna hava framíhjárætt at innlima lutir, sløg ella sýni, ið hava mentanarsøguligan ella náttúrusøguligan týdning í samlingar sínar, og at tað tí ikki eigur at vera nakar ivi um, at hesir lutir eru væl vardir móti privatari samlaratrongd, stuldri, niðurbróting, fíggjarligari úrnýtslu ella oyðilegging. Eisini hava søvn við musealum virksemi skyldu til at hava samlingarnar atkomuligar hjá almenningi og gransking. Lágmarksstandardur, professionalisering av starvsliðinum og ávísing av samfelagsligu skyldunum hjá søvnum við musealum virksemi eru tí týðandi partur av teimum etisku reglunum.

“International Council of Museums” varð stovnað sum felagsskapurin hjá søvnum undir UNESCO í 1946. Tær fyrstu etisku reglurnar vórðu samtyktar í 1970 og ásettar sum leiðreglur um innliman og handfaring av lutum á søvnum við musealum virksemi. Í 1986 vórðu fyri fyrstu ferð samtyktar reglur fyri alt virksemisøkið hjá søvnum. Í 2001 vórðu reglurnar endurskoðaðar og nútíðargjørdar, og enski teksturin, sum liggur sum

# Code of Ethics for Museums

## Introduction

This edition of the ICOM Code of Ethics for Museums is the culmination of six years' revision. Following a thorough review of the ICOM's Code in the light of contemporary museum practice, a revised version, structured on the earlier edition, was issued in 2001. As envisaged at that time, this has now been completely reformatted to give it the look and feel of the museum profession and is based on key principles of professional practice, elaborated to provide general ethical guidance.

The Code has been the subject of three periods of consultation with the membership. It was approved at the 21st General Assembly of ICOM, Seoul in 2004 with acclamation. The whole ethos of the document continues to be that of service to society, the community, the public and its various constituencies, and the professionalism of museum practitioners.

While there is a changed emphasis throughout the document resulting from the new structure, the accentuation of key points and the use of shorter paragraphs, very little is totally new. The new features will be found in paragraph 2.11 and the principles outlined in sections 3, 5 and 6. The Code of Ethics for Museums provides a means of professional self-regulation in a key area of public provision where legislation at a national level is variable and far from consistent. It sets minimum standards of conduct and performance to which museum professional staff throughout the world may reasonably aspire as well as a providing a statement of reasonable public expectation from the museum profession.

ICOM issued its Ethics of Acquisition in 1970 and a full Code of Professional Ethics in 1986. The present edition – and its interim document of 2001 – owe

grund undir hesi umsetingini, varð samtyktur á aðalráðstevnu hjá ICOM í 2004.

Skipanin í ICOM er, at hvørt limaland hevur eina nationala nevnd, sum umboðar altjóða felagsskapin í landinum. Føroyar fingu í 2009 atlimaskap í UNESCO og hava harvið bundið seg til at fylgja altjóða samtyktum, gjørdar í navninum á hesum og felagsskapum undir tí. Føroyar hava enn ikki fingið nakra nationala ICOM-nevnd; men føroysku høvuðssøvnini, Søvn Landsins og Listasavnið, eru limir í ICOM gjøgnum donsku nationalu nevndina.

Tær etisku reglurnar hjá ICOM umfata etisk evni, sum tað ikki ber til at lóggeva um. Tær umboða tí ein grundleggjandi hugburð, sum eigur at liggja sum grundarlag undir savnslóggávu hjá londum, ið hava limaskap í UNESCO. Tær etisku reglurnar stuðla soleiðis savnslóggávuni og eru ein vegleiðing um, hvør atferð er hóskandi í tí dagliga arbeiðinum hjá søvnum, bæði hjá stýrum og savnsstarvsfólkum, sama um tey eru starvssett á einum savni ella virka sjálvstøðugt. Reglurnar eru sostatt galdandi fyri øll, sum eru við til at reka alment savnsvirksemi, bæði á landsstovnum og landsgóðkendum stovnum í Føroyum.

Ætlanin við hesi umseting er at breiða út kunnleikan um tær etisku reglurnar og lætta um atgongdina til tær. Av tí at talan er um umseting av altjóða samtykt, har orðingarnar eru gjølla umhugsaðar, er tilráðingin frá etisku nevndini hjá ICOM um at almannagera enska tekstin saman við umsetingini fylgd. Hetta ger tað lætt at eftirkanna upprunaligu orðingarnar, um lesarin skuldi verið í iva.

Í innganginum til etisku reglurnar hjá ICOM verður útgreinað, hvussu umsetingar eiga at verða almannagjørdar. Umsetingin eigur at vera áteknað av í minsta lagi einari nationalari nevnd hjá ICOM í tí landinum, har málið verður talað, og nøvn teirra, ið sita í nationalu nevndini, eiga at verða nevnd. Av tí at Dansk ICOM er einasta nationala nevndin hjá ICOM í danska ríkinum, er umsetingin áteknað av nationalu nevndini í Danmark.

Desember 2012

much to that early work. The major work of revision and restructuring, however, fell on the members of the Ethics Committee. Their contribution in meetings – both actual and electronic – and their determination to meet both target and schedule is gratefully acknowledged. Their names are listed for reference. Having completed our mandate, we pass responsibility for the Code to a largely new committee membership, headed by Bernice Murphy, who brings to the work all the knowledge and experience of a past Vice-President of ICOM and a previous member of the Ethics Committee.

Like its precursors, the present Code provides a global minimum standard on which national and specialist groups can build to meet their particular requirements. ICOM encourages the development of national and specialist codes of ethics to meet particular needs and will be pleased to receive copies of these. They should be sent to the Secretary-General of ICOM, Maison de l'UNESCO, 1 rue Miollis, 75732

Paris Cedex 15, France. E-mail: secretariat@icom.museum

Geoffrey Lewis
Chair, ICOM Ethics Committee (1997-2004)
President of ICOM (1983-1989)

**ICOM Ethics Committee for the period 2001-2004**

***Chair:*** Geoffrey Lewis (UK)

***Members:*** Gary Edson (USA); Per Kåks (Sweden); Byung-mo Kim (Rep. of Korea); Pascal Makambila (Congo) – from 2002; Jean-Yves Marin (France); Bernice Murphy (Australia) to 2002; Tereza Scheiner (Brazil); Shaje'a Tshiluila (Democratic Rep. of Congo); Michel Van-Praët (France).

Ethical issues that require the attention and/or consideration of the ICOM Ethics Committee may be addressed to its Chair by e-mail: ethics@icom.museum.

*Umseting*: Andras Mortensen, Søvn Landsins
*Málslig grannskoðan*: Zakaris Svabo Hansen, Føroyamálsdeidin, Fróðskaparsetur Føroya

*Stýrið fyri ICOM Danmark*
Vinnie Nørskov, Århus Universitet
Mille Gabriel, Nationalmuseet
Jan Steen Jacobsen, Odsherreds kulturhistoriske Museum
Gertrud Oelsner, Fuglsang Kunstmuseum
Lise Ræder Knudsen
Tora Ribers, Told- og Skattemuseet
Joachim Meyer, Davids Samling

## Inngangur

**Støðan hjá etisku reglunum hjá ICOM**
Etisku reglurnar fyri søvn hjá ICOM eru gjørdar av altjóða ráðnum fyri søvn (International Coucil of Museums). Tær eru ein yvirlýsing um etikk hjá søvnum, sum lógirnar hjá ICOM vísa til. Reglurnar endurspegla grundreglur, sum søvn kring allan heim vanliga geva seg undir. Limaskapur í ICOM og árligt limagjald til ICOM eru staðfesting av etisku reglunum hjá ICOM.

**Lágmarksstandardur fyri søvn**
ICOM reglurnar eru at fata sum lágmarksstandardur fyri søvn. Tær eru lýstar sum ein røð av grundreglum, stuðlaðar við leiðreglum um ynskiliga professionella framferð. Í summum londum er ávísur lágmarksstandardur ásettur við lóg ella kunngerð. Í øðrum londum kunnu leiðreglur og metingar um lágmarksstandard fyri professionella atferð vera til taks sum "góðkenning", "innskriving" ella líknandi metingarskipan. Har ið tílíkir standardar ikki eru ásettir, kann vegleiðing fáast frá avgreiðsluskrivstovuni hjá ICOM, frá ICOM-nevndini í landinum ella skikkaðari altjóða ICOM-nevnd. Ætlanin er eisini, at einstøk lond og serligar undirskipanir viðvíkjandi søvnum eiga at nýta hesar reglur sum grundarlag fyri menning av ískoytisreglum.

**Umseting av etisku reglunum hjá ICOM**
Etisku reglurnar hjá ICOM eru almannagjørdar á teimum trimum almennu málunum hjá felagsskapinum: enskum, fronskum og sponskum. ICOM fegnast um umsetingar av reglunum til onnur mál. Ein umseting verður kortini einans mett sum "almenn", um hon er áteknað av í minsta lagi einari nationalari nevnd hjá ICOM í einum landi, har ið málið verður talað, vanliga fyrstamálinum í landinum. Um málið er talað í meira enn einum landi, er best, at tær nationalu nevndirnar í hesum londum eisini eru eftirspurdar. Gjørt verður vart við, at tørvur er á málsligum serkunnleika og professionellum savnsserkunnleika, tá almennar umsetingar verða gjørdar. Málið, sum liggur sum grund undir umsetingini og nøvn á nationalu nevndarlimunum

## Preamble

**Status of the ICOM Code of Ethics for Museums**
The ICOM Code of Ethics for Museums has been prepared by the International Council of Museums. It is the statement of ethics for museums referred to in the ICOM Statutes. The Code reflects principles generally accepted by the international museum community. Membership in ICOM and the payment of the annual subscription to ICOM are an affirmation of the ICOM Code of Ethics for Museums.

**A Minimum Standard for Museums**
The ICOM Code represents a minimum standard for museums. It is presented as a series of principles supported by guidelines for desirable professional practice. In some countries, certain minimum standards are defined by law or government regulation. In others, guidance on and assessment of minimum professional standards may be available in the form of 'Accreditation', 'Registration', or similar evaluative schemes. Where such standards are not defined, guidance can be obtained through the ICOM Secretariat, a relevant National Committee of ICOM, or the appropriate International Committee of ICOM. It is also intended that individual nations and the specialised subject organisations connected with museums should use this Code as a basis for developing additional standards. .

**Translations of the ICOM Code of Ethics for Museums**
The ICOM Code of Ethics for Museums is published in the three official languages of the organisation: English, French and Spanish. ICOM welcomes the translation of the Code into other languages. However, a translation will be regarded as "official" only if it is endorsed by at least one National Committee of a country in which the language is spoken, normally as the first language. Where the language is spoken in more than one country, it is preferable that the National Committees of these countries also be consulted. Attention is drawn to the need for linguistic as well as professional museum expertise in providing official translations. The

eiga at verða nevnd. Hesar treytir skerja kortini ikki møguleikan fyri, at reglurnar ella partar av teimum verða umsettar í sambandi við undirvísingar- ella granskingarendamál.

language version used for a translation and the names of the National Committees involved should be indicated. These conditions do not restrict translations of the Code, or parts of it, for use in educational work or for study purposes.

## Orðalisti

**Meting**: Staðfestingin av rættleika og virði hjá einum luti, slagi ella sýni. Í summum londum er enska hugtakið "apraisal" nýtt fyri sjálvstøðuga meting av eini ætlaðari gávu í sambandi við skatting.

**Áhugamálsstríð**: Persónlig ella privat áhugamál, sum koma í stríð við grundreglur í eini arbeiðsstøðu, soleiðis at lutloysi í avgerðum verður avmarkað ella sær út til at verða avmarkað.

**Konservator**: Starvsfólk á savni ella sjálvstøðugur vinnurekandi, sum hevur førleika til at gera tøkniligar kanningar, varðveiting, konservering og restaurering av mentanararvslutum. (Fleiri upplýsingar, sí ICOM News, vol. 39, n°1 (1986), pp. 5 6.)

**Mentanararvur**: Ein og hvør lutur ella hugtak, sum verður mettur at hava listfrøðiligan, søgufrøðiligan, vísindaligan ella andligan týdning.

**Handil**: Keyp og søla av lutum við persónligum ella stovnsligum vinningi í huga.

**Høviligt nærlagni**: Kravið um, at alt, ið gerast kann, er gjørt fyri at útvega sær sannar upplýsingar í einum máli, áðrenn avgerð verður tikin um eitt tiltak, serliga tá tað snýr seg um at avdúka upprunan og søguna hjá einum luti, sum verður boðin savninum til ognar ella nýtslu, áðrenn tikið verður ímóti lutinum.

**Stýri**: Persónarnir ella skipanirnar, sum eru allýstar í heimildarlógini hjá savninum, og sum hava ábyrgdina av savnsins varandi framhaldi, strategisku menning og fígging.

**Inntøkufíggjað virksemi**: Virksemi, sum er ætlað at

## Glossary

**Appraisal**: The authentication and valuation of an object or specimen. In certain countries the term is used for an independent assessment of a proposed gift for tax benefit purposes.

**Conflict of interest**: The existence of a personal or private interest that gives rise to a clash of principle in a work situation, thus restricting, or having the appearance of restricting, the objectivity of decision making.

**Conservator-Restorer**: Museum or independent personnel competent to undertake the technical examination, preservation, conservation and restoration of cultural property. (For further information, see ICOM News, vol. 39, n°1 (1986), pp. 5 6.)

**Cultural Heritage**: Any thing or concept considered of aesthetic, historical, scientific or spiritual significance.

**Dealing**: Buying and selling items for personal or institutional gain.

**Due diligence**: The requirement that every endeavour is made to establish the facts of a case before deciding a course of action, particularly in identifying the source and history of an item offered for acquisition or use before acquiring it.

**Governing Body**: The persons or organisations defined in the enabling legislation of the museum as responsible for its continuance, strategic development and funding.

**Income-generating activities**: Activities intended to

geva stovninum fíggjarliga inntøku ella vinning.

**Ognarheimild**: Lógligur rættur at eiga eina ogn í viðkomandi landi. I summum londum kann hetta vera ein tillutaður rættur og ikki nøktandi við atliti at krøvum í eini kanning við høviligum nærlagni.

**Lágmarksstandardur**: Ein standardur, sum tað er rímiligt at vænta, at øll søvn og starvsfólk á søvnum stremba eftir. Summi lond hava egnar yvirlýsingar um lágmarksstandard.

**Savn** 1): Eitt savn við musealum virksemi er ein varandi stovnur, sum á non-profit støði virkar fyri samfelagið og menning tess, sum er opin fyri almenninginum og savnar, skrásetur, varðveitir, granskar og miðlar materiellan og immateriellan vitnisburð um fólk og umhvørvi teirra. Hetta verður gjørt til frama fyri kanningarvirksemi, útbúgving og njóting.

**Starvsfólk á søvnum** 1): Starvsfólk á søvnum eru (sama um tey eru lønt ella ikki) manningin á søvnum ella stovnum, soleiðis sum hon er skilmarkað í grein 2, punkt 1 og 2, í viðtøkunum hjá ICOM, sum hava fingið serútbúgving ella hava samsvarandi verkligar royndir á einum øki, sum er viðkomandi fyri stýring og virksemi á einum musealum savni, og sjálvstøðugir persónar, sum virða etisku reglurnar hjá ICOM og starvast fyri søvn ella stovnar eins og skilmarkað í viðtøkunum nevndar eru omanfyri, men ikki persónar, sum marknaðarføra ella handla við vørum og útgerð, sum eru neyðug fyri søvn og savnsvirksemi.

**Náttúruarvur**: Ein og hvør natúrligur lutur, fyribrigdi ella hugtak, sum verður mettur at hava vísindaligan týdning ella at vera eitt andligt

bring financial gain or profit for the benefit of the institution.

**Legal title**: Legal right to ownership of property in the country concerned. In certain countries this may be a conferred right and insufficient to meet the requirements of a due diligence search.

**Minimum Standard**: A standard to which it is reasonable to expect all museums and museum personnel to aspire. Certain countries have their own statements of minimum standards.

**Museum** 1): A museum is a non-profit making permanent institution in the service of society and of its development, open to the public, which acquires, conserves, researches, communicates and exhibits, for purposes of study, education and enjoyment, the tangible and intangible evidence of people and their environment.

**Museum professional** 1): Museum professionals consist the personnel (whether paid or unpaid) of museums or institutions as defined in Article 2, paras. 1 and 2, of the Statutes, who have received specialised training, or possess an equivalent practical experience in any field relevant to the management and operations of a museum, and independent persons respecting the ICOM Code of Ethics for Museums and working for museums or institutions as defined in the Statute quoted above, but not persons promoting or dealing with commercial products and equipment required for museums and museum services.

**Natural Heritage**: Any natural thing, phenomenon or concept, considered to be of scientific significance or to be a spiritual

fyribrigdi.

**Non-profit skipan**: Eitt løggilt felag ella annar juridiskur persónur, hvørs inntøkur (íroknað yvirskot og vinningur) einans verða nýttar til frama fyri felagið og virksemi tess. Heitið “not-for-profit” hevur sama týdning.

**Uppruni**: Fullfíggjaða søgan og ognarskapurin hjá einum luti, eftir at hann varð funnin ella framleiddur til dagin í dag, sum avgera rættleika og ognarskap.

**Rættargildur ognarrættur**: Óvikandi rættur til ognarskap av ogn, stuðlaður av fullfíggjaðum kunnleika um uppruna hjá lutinum, eftir at hann var funnin ella framleiddur.

1) Hugtøkini “savn við musealum virksemi” og “starvsfólk á søvnum” eru umseting av ensku hugtøkunum “museum” og “museum professional”. Lagt eigur at vera til merkis, at upprunahugtøkini eru fyribils allýsingar, gjørd til tulking av etisku reglunum hjá ICOM. Allýsingarnar av hugtøkunum “museum” og “professional museum workers”, sum verða nýtt í viðtøkunum hjá ICOM, vera verandi í gildi til endurskoðan av hesum skjalinum er gjørd.

manifestation.

**Non-profit organisation**: A legally established body-corporate or unincorporatedwhose income (including any surplus or profit) is used solely for the benefit of that body and its operation. The term "not-for-profit" has the same meaning.

**Provenance**: The full history and ownership of an item from the time of its discovery or creation to the present day, from which authenticity and ownership is determined.

**Valid title**: Indisputable right to ownership of property, supported by full provenance of the item from discovery or production.

1) It should be noted that the terms "museum" and "museum professional" are interim definitions for use in interpreting the ICOM Code of Ethics for Museums. The definitions of "museum" and "professional museum workers" used in the ICOM Statutes remain in force until the revision of that document has been completed.

## 1. Søvn við musealum virksemi varðveita, tulka og greina náttúru- og mentanarv hjá mannaættini

***Grundregla:*** *Museal søvn hava ábyrgd av tí materiella og immateriella náttúru- og mentanararvinum.*

*Stýri, leiðslur og eftirlitsmyndugleikar hjá søvnunum hava ta týdningarmestu ábyrgdina av at varðveita og fremja henda arv og at umsita tað menniskjansliga, fysiska og fíggjarliga tilfeingi, sum er tøkt til hesi endamál.*

## Museums preserve, interpret and promote the natural and cultural inheritance of humanity

***Principle:*** *Museums are responsible for the tangible and intangible natural and cultural heritage.*

*Governing bodies and those concerned with the strategic direction and oversight of museums have a primary responsibility to protect and promote this heritage as well as the human, physical and financial resources made available for that purpose.*

### STOVNSFESTING

1.1 **Viðtøkur**

Leiðslan á savninum eigur at tryggja, at savnið hevur niðurskrivaðar og atkomuligar viðtøkur, sum skjalfesta løgfrøðiligu støðuna hjá savninum, endamáli tess og at tað er ein varandi og almannagagnligur stovnur.

1.2 **Endamál og uppgávur**

Uppgáva, endamál og strategi savnsins og leikluturin hjá stýrinum og samansetingin av tí skulu síggjast í viðtøkunum.

### INSTITUTIONAL STANDING

1.1 **Enabling documentation**

The governing body should ensure that the museum has a written and published constitution, statute or other public document, in accordance with national laws which clearly states the museum's legal status, mission, permanence, and nonprofit nature.

1.2 **Statement of the Mission, Objectives, and Policies**

The governing body should prepare, publicise and be guided by a statement of the mission, objectives, and policies of the museum and of the role and composition of the governing body.

### HØLISVIÐURSKIFTI

1.3 **Høli**

Leiðslan eigur at tryggja, at savnið ræður yvir hóskandi hølum, har inniumhvørvið ger tað møguligt at varða av uppgávum og endamáli savnsins.

1.4 **Atgongd**

Leiðslan eigur at tryggja, at savnið og samlingar tess regluliga og til rímiligar tíðir

### PHYSICAL RESOURCES

1.3 **Premises**

The governing body should ensure adequate premises with a suitable environment for the museum to fulfil the basic functions defined in its mission.

1.4 **Access**

The governing body should ensure that the museum and its collections are available to all

eru atkomulig fyri øll. Serlig fyrilit skulu sýnast fólki við serligum tørvi.

during reasonable hours and for regular periods. Particular regard should be given to those persons with special needs.

1.5 **Arbeiðsumhvørvi og trygd**

Leiðslan eigur at tryggja, at galdandi krøv viðvíkjandi arbeiðsumhvørvi, trygd og atgongd verða hildin, bæði fyri vitjandi og starvsfólk.

**Health and Safety**

The governing body should ensure that institutional standards of health, safety, and accessibility apply to its personnel and visitors.

1.6 **Vanlukkutilbúgving**

Leiðslan eigur at  gera og halda við líka leiðreglur, sum tryggja vitjandi og starvsfólk, samlingar og annað tilfeingi móti vanlukkum av mannaávum og náttúruvanlukkum.

**Protection Against Disasters**

The governing body should develop and maintain policies to protect the public and personnel, the collections and other resources, against natural and human-made disasters.

1.7 **Trygdarkrøv**

Leiðslan eigur at  tryggja, at samlingarnar eru nøktandi tryggjað móti stuldri, eldi og øðrum skaða í framsýningum, arbeiðs- og goymsluøkjum og undir flutningi.

**Security Requirements**

The governing body should ensure appropriate security to protect collections against theft or damage in displays, exhibitions, working or storage areas, and while in transit.

1.8 **Trygging og endurgjald**

Um handilslig trygging er teknað fyri samlingar, skal leiðslan tryggja, at fulnaðurin er nøktandi og eisini fevnir um tilfar undir flutningi, út- og innlænt objekt og annað tilfar, sum savnið hevur ábyrgd av. Er savnið sjálvtryggjað ella umfatað av indemnity-avtalu, skal ansast eftir, at tilfar, sum savnið ikki eigur, er nøktandi tryggjað.

**Insurance and Indemnity**

Where commercial insurance is used for collections, the governing body should ensure that such cover is adequate and includes objects in transit or on loan and other items that are the responsibility of the museum. When an indemnity scheme is in use, it is necessary that material not in the ownership of the museum is adequately covered.

## FÍGGJARLIGT TILFEINGI

1.9 **Fígging**

Leiðslan eigur at tryggja, at nøktandi fígging er til at halda og menna virksemi savnsins. Fíggjarviðurskiftini skulu eftiransast væl og virðiliga roknskjaparfakliga.

## FINANCIAL RESOURCES

**Funding**

The governing body should ensure that there are sufficient funds to carry out and develop the activities of the museum. All funds must be accounted for in a professional manner.

1.10 **Inntøkufíggjað virksemi**

Leiðslan eigur at hava niðurskrivaðar leiðreglur fyri, hvussu savnið kann útvega sær inntøkur gjøgnum virksemi sítt, ella hvør stuðul uttanífrá kann góðtakast. Sama

**Income-generating Policy**

The governing body should have a written policy regarding sources of income that it may generate through its activities or accept from outside sources. Regardless of funding

hvaðan fígging kemur, eiga søvn at varðveita tamarhald á innihaldi og sjálvræðisrætt í virksemi sínum. Inntøkufíggjað virksemi má ikki seta avmarkingar fyri standardin hjá savninum ella teimum vitjandi (sí 6.6).

source, museums should maintain control of the content and integrity of their programmes, exhibitions and activities. Income-generating activities should not compromise the standards of the institution or its public (See 6.6).

## STARVSFÓLK

1.11 **Setanarpolitikkur**
Leiðslan eigur at tryggja, at allar avgerðir viðvíkjandi starvsfólkum verða tiknar í samsvari við viðtøkur savnsins og fylgja galdandi reglum á økinum.

1.12 **Tilnevning av savnsleiðarum**
Savnsleiðarin hevur eina lyklastøðu, og tá ið ein leiðari skal tilnevnast, eigur stýrið at geva teimum kunnleikum og førleikum gætur, sum eru neyðugir til tess at kunna røkja savnsleiðarastarvið til fulnar. Førleikakrøvini eiga at fevna um hóskandi intellektuell evni, fakliga vitan og álítandi etiska framferð.

1.13 **Viðurskiftini við stýrið**
Ein savnsleiðari eigur at hava beinleiðis ábyrgd mótvegis stýrinum og hava beinleiðis atgongd til stýrið.

1.14 **Førleikar hjá starvsfólkum**
Starvsfólk skulu setast við støði í tí sakkunnleika, sum krevst fyri at kunna loysa uppgávurnar á ábyrgdarøkinum. (Sí eisini 2.18; 2.24; 8.12).

1.15 **Eftirútbúgving**
Eftirútbúgving og førleikamenning eiga at verða boðin øllum starvsfólkum, soleiðis at savnið altíð hevur ta best møguligu arbeiðsorkuna.

1.16 **Etisk stríðsmál**
Leiðslan eigur ikki at krevja av starvsfólkunum, at tey bera seg at á ein hátt, sum kemur teimum í stríð við etisku

## PERSONNEL

**Employment Policy**
The governing body should ensure that all action concerning personnel is taken in accordance with the policies of the museum as well as the proper and legal procedures.

**Appointment of the Director or Head**
The director or head of the museum is a key post and when making an appointment, governing bodies should have regard for the knowledge and skills required to fill the post effectively. These qualities should include adequate intellectual ability and professional knowledge, complemented by a high standard of ethical conduct.

**Access to Governing Bodies**
The director or head of a museum should be directly responsible, and have direct access, to the relevant governing bodies.

**Competence of Museum Personnel**
The employment of qualified personnel with the expertise required to meet all responsibilities is necessary. (See also 2.18; 2.24; 8.12).

**Training of Personnel**
Adequate opportunities for the continuing education and professional development of all museum personnel should be arranged to maintain an effective workforce.

**Ethical Conflict**
The governing body should never require museum personnel to act in a way that could be considered to conflict with the provisions of this

| | | |
|---|---|---|
| | reglurnar hjá ICOM, galdandi lóg ella aðrar faketiskar reglur. | Code of Ethics, or any national law or specialist code of ethics. |
| **1.17** | **Starvsfólk og sjálvboðin**<br>Leiðslan eigur at hava niðurskrivaðar leiðreglur fyri luttøku hjá sjálvbodnum í arbeiðinum. Leiðreglurnar skulu tryggja jalig viðurskifti millum tey sjálvbodnu og savnsstarvsfólk. | **Museum Personnel and Volunteers**<br>The governing body should have a written policy on volunteer work which promotes a positive relationship between volunteers and members of the museum profession. |
| **1.18** | **Sjálvboðin og etikkur**<br>Leiðslan eigur at  tryggja, at sjálvboðin, tá ið tey fáast við musealt virksemi og persónligt virksemi annars, hava fullan kunnleika til etisku reglurnar hjá ICOM og aðrar viðkomandi reglur og lógir. | **Volunteers and Ethics**<br>The governing body should ensure that volunteers, when conducting museum and personal activities, are fully conversant with the ICOM Code of Ethics for Museums and other applicable codes and laws. |

## 2. Søvn hava í varðveitslu samlingar til frama fyri samfelagið og samfelagsmenningina

## Museums that maintain collections hold them in trust for the benefit of society and its development

***Grundregla:*** *Søvn hava skyldu til at savna, varðveita og miðla samlingarnar sum eitt íkast til at verja náttúru-, mentanar- og vísindaligan arv. Samlingarnar eru ein týðandi almennur arvur, sum hevur serligt pláss í lóggávuni og verður vardur av altjóða sáttmálum. Hesin arvur krevur góða umsiting, lóglig eigaraviðurskifti, gildistíð, skjalfesting, atkomuleika og ábyrgdarfulla úrskiljing.*

***Principle:*** *Museums have the duty to acquire, preserve and promote their collections as a contribution to safeguarding the natural, cultural and scientific heritage. Their collections are a significant public inheritance, have a special position in law and are protected by international legislation. Inherent in this public trust is the notion of stewardship that includes rightful ownership, permanence, documentation, accessibility and responsible disposal.*

### INNSAVNING

### ACQUIRING COLLECTIONS

**2.1 Innsavningarpolitikkur**

Leiðslan eigur at orða og almannakunngera leiðreglur fyri innsavning, varðveiting og handfaring av samlingunum. Leiðreglurnar eiga eisini at fevna um tað tilfar, sum ikki verður skrásett, konserverað ella sýnt fram (Sí 2.7; 2.8).

**Collections Policy**

The governing body for each museum should adopt and publish a written collections policy that addresses the acquisition, care and use of collections. The policy should clarify the position of any material that will not be catalogued, conserved, or exhibited (See 2.7; 2.8 ).

**2.2 Lóglig ognarheimild**

Eingin lutur og einki lívfrøðiligt slag eigur at verða innsavnað sum keyp, gáva, lán, arvur ella sum umbýti, uttan so at savnið er sannført um, at ognarrætturin hevur rættargildi. Skjalprógv um lógligan ognarskap í einum landi merkir ikki endiliga tað sama sum rættargildur ognarrættur.

**Valid Title**

No object or specimen should be acquired by purchase, gift, loan, bequest, or exchange unless the acquiring museum is satisfied that a valid title is held. Evidence of lawful ownership in a country is not necessarily valid title.

**2.3 Uppruni og høviligt nærlagni**

Áðrenn tikið verður ímóti einum luti ella slagi eigur alt, ið gerast kann, at verða gjørt fyri at tryggja, at luturin ella slagið, sum verður boðið savninum sum keyp, gáva, lán, arvur ella umbýti, ikki er ólógliga útvegað, innflutt ella útflutt úr upprunalandinum ella einum gjøgnumfarslandi, har tað kann hava verið í lógligari ogn (íroknað í landinum hjá

**Provenance and Due Diligence**

Every effort must be made before acquisition to ensure that any object or specimen offered for purchase, gift, loan, bequest, or exchange has not been illegally obtained in or exported from, its country of origin or any intermediate country in which it might have been owned legally (including the museum's own country). Due diligence in this regard should establish the full

savninum sjálvum). Høviligt nærlagni í sambandi við hetta eigur at fáa til vega alla søguna hjá lutinum, eftir at hann varð funnin ella framleiddur.

history of the item from discovery or production.

**2.4 Lutir, sløg og sýni úr ikki-góðkendum ella óvísindaligum kanningararbeiði**

Søvn eiga ikki at savna inn lutir, um tað er rímilig orsøk til at halda, at teir stava frá ikki-góðkendum ella óvísindaligum virksemi, tilvitaðari oyðilegging ella skaða á minnismerki, fornfrøðilig ella jarðfrøðilig støð, lívfrøðilig sløg ella natúrlig livistøð. Útvegan má heldur ikki fara fram, um tað vísir seg, at ánarin ella brúkarin av økinum ella avvarðandi myndugleikar ikki hava fingið fráboðan um tað, ið er funnið.

**Objects and Specimens from Unauthorised or Unscientific Fieldwork**

Museums should not acquire objects where there is reasonable cause to believe their recovery involved the unauthorised, unscientific, or intentional destruction or damage of monuments, archaeological or geological sites, or species and natural habitats. In the same way, acquisition should not occur if there has been a failure to disclose the finds to the owner or occupier of the land, or to the proper legal or governmental authorities.

**2.5 Mentanarliga viðbrekið tilfar**

Samlingar við menniskjaleivdum og tilfari, ið hevur átrúnaðarligan týdning, eiga einans at verða innlimaðar í savn, um tær kunnu goymast trygt og við virðing. Hetta má gerast í samsvari við professionellan standard og áhugamál og trúgv hjá limum í tí samfelagnum, etnisku ella átrúnaðarligu bólkunum, haðani lutirnir koma, um teir eru kendir (Sí eisini 3.7; 4.3).

**Culturally Sensitive Material**

Collections of human remains and material of sacred significance should be acquired only if they can be housed securely and cared for respectfully. This must be accomplished in a manner consistent with professional standards and the interests and beliefs of members of the community, ethnic or religious groups from which the objects originated, where these are known (See also 3.7; 4.3).

**2.6 Vernd av lívfrøðiligum ella jarðfrøðiligum sýnum**

Søvn mugu ikki savna inn lívfrøðilig ella jarðfrøðilig sýni, sum eru savnað, seld ella á annan hátt fingin til vega í stríð við lokala, nationala ella internationala lóggávu ella sáttmálar um djóralív ella reglur um náttúrusøguliga varðveiting.

**Protected Biological or Geological Specimens**

Museums should not acquire biological or geological specimens that have been collected, sold, or otherwise transferred in contravention of local, national, regional or international law or treaty relating to wildlife protection or natural history conservation.

**2.7 Livandi samlingar**

Tá ið samlingarnar fevna um livandi plantufrøðilig ella djórafrøðilig sløg, eiga serlig fyrilit at verða sýnd tí natúrliga og sosiala umhvørvinum, haðani tey koma, og fyrilit eiga at verða sýnd lokalari, nationalari, regionalari ella internationalari lóggávu ella sáttmálum um vernd av djóralívi ella

**Living Collections**

When the collections include live botanical and zoological specimens, special considerations should be made for the natural and social environment from which they are derived as well as any local, national, regional or international law, or treaty relating to wildlife protection or natural history conservation.

náttúrusøguligari varðveiting.

2.8 **Nýtslusamlingar**

Innsavningarpolitikkurin hjá savninum kann fevna um reglur fyri nýtslusamlingar, har serligur dentur verður lagdur á at varðveita av mentanarligar, vísindaligar ella tøkniligar tilgongdir heldur enn at varðveita lutin sjálvan, ella har lutirnir eru innsavnaðir fyri at verða nýttir í verki ella í undirvísingarhøpi (Sí eisini 2.1).

**Working Collections**

The collections policy may include special considerations for certain types of working collection where the emphasis is on preserving cultural, scientific or technical process rather than the object, or where objects or specimens are assembled for regular handling and teaching purposes (See also 2.1).

2.9 **Útvegan uttan fyri innsavningarpolitikkin**

Útvegan av lutum ella sløgum, sum ikki eru fevnd av innsavningarpolitikki savnsins, eigur einans í undantaksføri at fara fram. Leiðslan eigur at gera sær neyvar metingar av tí fakliga støðinum og tryggja sær, at øll áhugamál eru hoyrd. Umráðingarnar skulu umfata týdningin hjá lutinum ella slagnum fyri náttúru- og mentanararvin, og eisini tann serliga áhugan, sum onnur søvn, ið savna tílíkt tilfar, kunnu hava. Heldur ikki undir hesum umstøðum mugu lutir ella sløg verða savnað uttan rættargildan ognarrætt (Sí eisini 3.4).

**Acquisition Outside Collections Policy**

The acquisition of objects or specimens outside the museum's stated policy should only be made in exceptional circumstances. The governing body should consider the professional opinions available to them, and the views of all interested parties. Consideration will include the significance of the object or specimen including its context in the cultural or natural heritage, and the special interests of other museums collecting such material. However, even in these circumstances, objects without a valid title should not be acquired (See also 3.4).

2.10 **Útvegan umvegis stýrislimir ella starvsfólk**

Serligt nærlagni krevst, um savnið frá stýrislimum, starvsfólkum, avvarðandi teirra ella góðum vinum fær boðið ein lut ella slag sum keyp ella gávu.

**Acquisition by Members of the Governing Body and Museum Personnel**

Special care is required in considering any item, either for sale, as a donation or as a tax-benefit gift, from members of governing bodies, museum personnel, or the families and close associates of these persons.

2.11 **Savnið sum síðsta varðveitingarstig**

Einki í hesum etisku reglum skal forða einum savni í at virka sum eitt løggilt varðveitingarstað fyri lutir ella sløg, ið hava ógreiðan uppruna ella eru ólógliga innsavnað í tí økinum, sum savnið hevur løgliga ábyrgd av.

**Repositories of Last Resort**

Nothing in this Code of Ethics should prevent a museum from acting as an authorised repository for unprovenanced, illicitly collected or recovered specimens and objects from the territory over which it has lawful responsibility

## ÚRSKILJING ÚR SAMLINGUM

## REMOVING COLLECTIONS

2.12 **Heimild til úrskiljing**

**Legal or Other Powers of Disposal**

Um savnið hevur heimild til at úrskilja úr samlingunum, ella um savnið undir innsavningini hevur tryggjað sær rætt til at sleppa sær av við lutir aftur, skulu tær løgfrøðiligu treytirnar og mannagongdirnar fyri hesum fylgjast neyvt. Um tað í sambandi við útvegan eru gjørdar avtalur, sum hava við sær avmarkingar í virkisfrælsi savnsins, eiga hesar avtalur at verða virdar, uttan so at tær eru ógjørligar at fylgja ella skaða stovnin. Um so er, eigur savnið at royna at fáa avmarkingarnar gjørdar lagaligari.

Where the museum has legal powers permitting disposals, or has acquired objects subject to conditions of disposal, the legal or other requirements and procedures must be complied with fully. Where the original acquisition was subject to mandatory or other restrictions these conditions must be observed, unless it can be shown clearly that adherence to such restrictions is impossible or substantially detrimental to the institution and, if appropriate, relief may be sought through legal procedures.

**2.13 Úrskiljing úr samlingum**

Úrskiljing av einum luti ella slagi úr eini museumssamling kann einans gerast við fullari fatan fyri týdninginum hjá lutinum ella slagnum, eyðkennum (um tað er óbøtiligt ella ikki), rættarligari støðu og tí missi av almennum áliti, sum kann verða avleiðingin av eini úrskiljing.

**Deaccessioning from Museum Collections**

The removal of an object or specimen from a museum collection must only be undertaken with a full understanding of the significance of the item, its character (whether renewable or non-renewable), legal standing, and any loss of public trust that might result from such action.

**2.14 Ábyrgd av úrskiljing**

Avgerð um úrskiljing eigur at vera ábyrgdin hjá stýrinum í samstarvi við savnsstjóran og savnvørðin fyri viðkomandi samling. Serligar reglur kunnu galda fyri nýtslusamlingar (Sí 2.7; 2.8).

**Responsibility for Deaccessioning**

The decision to deaccession should be the responsibility of the governing body acting in conjunction with the director of the museum and the curator of the collection concerned. Special arrangements may apply to working collections (See 2.7; 2.8).

**2.15 Ræði á úrskildum lutum**

Hvørt savn eigur at hava leiðreglur, sum allýsa hættir til varandi burturtøku av lutum úr samlingunum gjøgnum gávu, flutning, umbýti, sølu, afturbering til upprunaland ella fyribeining. Leiðreglurnar skulu samstundis tryggja, at tann óavmarkaða ognarheimildin verður latin víðari til móttakaran. Fullfíggjað skjalfesting eigur at verða gjørd um allar avgerðir í sambandi við úrskiljing, lutirnar, sum málið snýr seg um, og avhendingina av teimum. Gingið verður út frá, at ein úrskildur lutur altíð fyrst verður boðin einum øðrum savni.

**Disposal of Objects Removed from the Collections**

Each museum should have a policy defining authorised methods for permanently removing an object from the collections through donation, transfer, exchange, sale, repatriation, or destruction, and that allows the transfer of unrestricted title to the receiving agency. Complete records must be kept of all deaccessioning decisions, the objects involved, and the disposition of the object. There will be a strong presumption that a deaccessioned item should first be offered to another museum.

2.16 **Inntøkur í sambandi við úrskiljing úr samlingunum**

Museumssamlingar verða hildnar í almennari varðveitslu og mugu tí ikki viðgerast sum umsetilig aktiv. Um savnið fær pening ella annað endurgjald í sambandi við úrskiljing av lutum ella sløgum úr samlingum, eigur hetta einans at verða nýtt til gagns fyri samlingina og vanliga til útvegan til somu samling.

**Income from Disposal of Collections**

Museum collections are held in public trust and may not be treated as a realisable asset. Money or compensation received from the deaccessioning and disposal of objects and specimens from a museum collection should be used solely for the benefit of the collection and usually for acquisitions to that same collection.

2.17 **Keyp av úrskildum samlingum**

Starvsfólk, stýri, avvarðandi teirra ella vinir eiga ikki at fáa loyvi at útvega sær lutir ella sløg, sum eru úrskild úr samlingum, sum tey hava ábyrgd av.

**Purchase of Deaccessioned Collections**

Museum personnel, the governing body, or their families or close associates, should not be permitted to purchase objects that have been deaccessioned from a collection for which they are responsible.

## RØKT AV SAMLINGUM

## CARE OF COLLECTIONS

2.18 **Framhald í samlingunum**

Savnið skal gera og virka eftir leiðreglum, sum tryggja, at samlingar tess (bæði varandi og fyribils) og tann tilhoyrandi skjalfestingin er hóskandi skrásett og atkomulig og at tey verða víðarigivin til komandi ættarlið í so góðum og tryggum standi sum gjørligt við fyriliti fyri verandi vitan og tilfeingi.

**Collection Continuity**

The museum should establish and apply policies to ensure that its collections (both permanent and temporary) and associated information, properly recorded, are available for current use and will be passed on to future generations in as good and safe a condition as practicable, having regard to current knowledge and resources.

2.19 **Heimiling av ábyrgd fyri samlingum**

Tann fakliga ábyrgdin fyri umsiting av samlingum eigur at verða latin persónum, sum hava skikkaða vitan og førleikar ella sum eru undir hóskandi vegleiðing. (Sí eisini 8.11).

**Delegation of Collection Responsibility**

Professional responsibilities involving the care of the collections should be assigned to persons with appropriate knowledge and skill or who are adequately supervised. (See also 8.11).

2.20 **Skráseting av samlingunum**

Museumssamlingar eiga at verða skjalfestar í samsvari við samtyktar fakligar standardar. Tílík skjalfesting eigur at umfata fullfíggjaða eyðmerking og lýsing av hvørjum luti, samanhangi hansara, uppruna, støðu, konserveringsfakligari viðgerð og núverandi goymslustøðu. Hesar upplýsingar eiga at verða hildnar í tryggum umhvørvi og vera stuðlaðar av leitiskipan, sum gevur atgongd til upplýsingar – bæði fyri starvsfólk savnsins

**Documentation of Collections**

Museum collections should be documented according to accepted professional standards. Such documentation should include a full identification and description of each item, its associations, provenance, condition, treatment and present location. Such data should be kept in a secure environment and be supported by retrieval systems providing access to the information by the museum personnel and other legitimate users.

og aðrar heimilaðar brúkarar.

| | | |
|---|---|---|
| 2.21 | **Vernd móti vanlukkum**<br>Savnið eigur at gera leiðreglur um handfaring av samlingunum undir vápnaðum stríði ella øðrum menniskjaskaptum vanlukkum og náttúruvanlukkum. | **Protection Against Disasters**<br>Careful attention should be given to the development of policies to protect the collections during armed conflict and other human-made or natural disasters. |
| 2.22 | **Vernd av viðkvomum upplýsingum**<br>Savnið skal tryggja, at trúnaðarupplýsingar ikki verða latnar víðari, tá upplýsingar úr samlingunum verða gjørdar alment atkomuligar. | **Security of Collection and Associated Data**<br>The museum should exercise control to avoid disclosing sensitive personal or related information and other confidential matters when collection data is made available to the public. |
| 2.23 | **Fyribyrgjandi konservering**<br>Fyribyrgjandi konservering er ein týðandi partur av musealum virksemi og røkt av samlingum. Tað er ein grundleggjandi ábyrgd hjá øllum, sum starvast á einum savni, at skapa og tryggja hóskandi umstøður fyri tær samlingar, sum tey hava ábyrgd av – bæði í goymslum, framsýningum og undir flutningi. | **Preventive Conservation**<br>Preventive conservation is an important element of museum policy and collections care. It is an essential responsibility of members of the museum profession to create and maintain a protective environment for the collections in their care, whether in store, on display, or in transit. |
| 2.24 | **Konservering og umvæling av samlingum**<br>Savnið eigur neyvt at hava eftirlit við støðuni hjá samlingunum fyri at kunna gera av, nær ein lutur, slag ella eitt sýni krevur konservering ella umvæling hjá einum skikkaðum konservatori. Tað týdningarmesta málið eigur at vera at tryggja og styrkja lutin ella sýnið. Alt konserveringsarbeiði eigur at vera skjalfest og vera so reversibult sum gjørligt, og allar broytingar eiga at vera lættar at kenna aftur frá tí upprunaliga lutinum, slagnum ella sýninum. | **Collection Conservation and Restoration**<br>The museum should carefully monitor the condition of collections to determine when an object or specimen may require conservation-restoration work and the services of a qualified conservator-restorer. The principal goal should be the stabilisation of the object or specimen. All conservation procedures should be documented and as reversible as possible, and all alterations should be clearly distinguishable from the original object or specimen. |
| 2.25 | **Vælferð hjá livandi dýrum**<br>Eitt savn, sum hevur livandi dýr, eigur at átaka sær fulla ábyrgd av heilsu og vælferð hjá dýrinum. Savnið eigur at gera og nýta trygdarreglur, sum verja starvsfólk og vitjandi eins og dýrini sjálv. Hesar reglur skulu góðkennast av djóralæknafrøðiliga eftirlitinum. Arvfrøðilig tillaging eigur at vera greitt eyðmerkt. | **Welfare of Live Animals**<br>A museum that maintains living animals should assume full responsibility for their health and well-being. It should prepare and implement a safety code for the protection of its personnel and visitors, as well as of the animals, that has been approved by an expert in the veterinary field. Genetic modification should be clearly identifiable. |

**2.26 Persónlig nýtsla av museumssamlingum**

Starvsfólk, stýri, avvarðandi teirra, vinir og onnur eiga ikki at fáa loyvi til at nýta lutir úr savnssamlingum til persónliga nýtslu yvirhøvur, heldur ikki fyribils.

**Personal Use of Museum Collections**

Museum personnel, the governing body, their families, close associates, or others should not be permitted to expropriate items from the museum collections, even temporarily, for any personal use.

## 3. Søvn varða av fyrstukeldum til tess at grunda og fremja vitan

## Museums hold primary evidence for establishing and furthering knowledge

***Grundregla:*** *Søvn hava vegna øll serliga ábyrgd av eftiransing, atgongd og tulking av fyrstukeldum, sum eru savnaðar og varðveittar í samlingunum.*

***Principle:*** *Museums have particular responsibilities to all for the care, accessibility and interpretation of primary evidence collected and held in their collections.*

### FYRSTUKELDUR

3.1 **Samlingar sum fyrstahonds keldur**

Leiðreglur fyri samlingar, sum søvnini hava, eiga greitt at sýna týdningin av samlingunum sum fyrstukeldur. Leiðreglurnar eiga ikki at verða stýrdar av núligum andsrákum ella musealari siðvenju einans.

3.2 **Atkoma til samlingarnar**

Søvn hava eina serliga ábyrgd fyri at gera samlingar og allar viðkomandi upplýsingar atkomuligar so frítt sum gjørligt, havandi í huga høvilig fyrilit fyri trúnaði og trygd.

### PRIMARY EVIDENCE

3.1 **Collections as Primary Evidence**

The museum collections policy should indicate clearly the significance of collections as primary evidence. The policy should not be governed only by current intellectual trends or present museum usage.

3.2 **Availability of Collections**

Museums have a particular responsibility for making collections and all relevant information available as freely as possible, having regard to restraints arising for reasons of confidentiality and security.

### INNSAVNING OG GRANSKING

3.3 **Innsavning undir kanningararbeiði**

Søvn, sum gera kanningararbeiði, eiga at gera leiðreglur fyri hesum í samsvari við góðan fakligan standard, altjóða lóggávu og sáttmálaligar bindingar. Kanningararbeiði eigur einans at verða gjørt við virðing og fyriliti fyri tí lokala samfelagnum, mentanarumhvørvi tess og við trygging av náttúru- og mentanararvinum í hyggju.

3.4 **Undantaksinnsavning av fyrstukeldum**

Í undantaksførum kann ein lutur av ókendum uppruna metast at hava so einastandandi týdning fyri vitan, at tað hevur almennan áhuga at varðveita hann. Avgerðin um at lata ein tílíkan lut ganga inn í eitt savn eigur at

### MUSEUM COLLECTING & RESEARCH

3.3 **Field Collecting**

Museums undertaking field collecting should develop policies consistent with academic standards and applicable national and international laws and treaty obligations. Fieldwork should only be undertaken with respect and consideration for the views of local communities, their environmental resources and cultural practices as well as efforts to enhance the cultural and natural heritage.

3.4 **Exceptional Collecting of Primary Evidence**

In exceptional cases an item without provenance may have such an inherently outstanding contribution to knowledge that it would be in the public interest to preserve it. The acceptance of such an item into a museum

verða tikin av serfrøðingum á viðkomandi øki og uttan frammanundan at hava tikið støðu til national ella international áhugamál. (Sí eisini 2.11).

collection should be the subject of a decision by specialists in the discipline concerned and without national or international prejudice. (See also 2.11).

3.5 **Gransking**

Gransking, sum starvsfólk á søvnum gera, eigur at hava samband við endamál og uppgávur savnsins og fylgja lógligum, etiskum og akademiskum arbeiðsháttum.

**Research**

Research by museum personnel should relate to the museum's mission and objectives and conform to established legal, ethical and academic practices.

3.6 **Oyðileggjandi greining**

Tá ið oyðileggjandi greiningartøkni verður nýtt, eigur at gerast ein sera neyv skráseting av tí greinaða tilfarinum. Úrslitið av greiningini og granskingararbeiðið í tí sambandi – útgávur íroknaðar – skal síggjast í skjalfestingini hjá savninum.

**Destructive Analysis**

When destructive analytical techniques are undertaken, a complete record of the material analysed, the outcome of the analysis and the resulting research, including publications, should become a part of the permanent record of the object.

3.7 **Samlingar við humanum uppruna og tilfar av átrúnaðarligum slag**

Gransking í menniskjaleivdum og tilfari, ið hevur átrúnaðarligan týdning, eigur at verða gjørt í samsvari við professionellar standardar og við virðing fyri áhugamálum og trúgv hjá tí samfelagnum, etnisku ella átrúnaðarligu bólkunum, haðani lutirnir koma, um teir eru kendir (Sí eisini 2.5; 4.3).

**Human Remains and Material of Sacred Significance**

Research on human remains and materials of sacred significance must be accomplished in a manner consistent with professional standards and take into account the interests and beliefs of the community, ethnic or religious groups from whom the objects originated, where these are known. (See also 2.5; 4.3).

3.8 **Rætturin til granskingartilfar**

Tá starvsfólk á søvnum fyrireika tilfar til miðlan ella skjalfesting av feltarbeiði, eigur at vera til taks greið avtala við savnið, sum útvegar fígging, um øll rættindi í sambandi við tílíkt arbeiði.

**Retention of Rights to Research Materials**

When museum personnel prepare material for presentation or to document field investigation, there must be clear agreement with the sponsoring museum regarding all rights to such work.

3.9 **Vitanarbýti**

Starvsfólk á søvnum hava skyldu til at skifta vitan og royndir við starvsfelagar, granskarar og lesandi á viðkomandi fakøkjum. Tey eiga at virða og viðurkenna tey, sum gingu undan, og eiga at handa víðari framburð í tøkni og royndum, sum kann verða til gagns hjá øðrum.

**Shared Expertise**

Members of the museum profession have an obligation to share their knowledge and experience with colleagues, scholars and students in relevant fields. They should respect and acknowledge those from whom they have learned and should pass on such advancements in techniques and experience that may be of benefit to others.

## 3.10 Samstarv millum søvn og aðrar stovnar

Starvsfólk á søvnum eiga at viðurkenna og stuðla tørvinum á samstarvi og ráðførslu millum stovnar við líknandi áhugamálum og innsavningarvirksemi. Hetta er serliga galdandi fyri hægri lærustovnar og ávísar almennar fyritøkur og stovnar, har gransking kann framleiða týðandi samlingar uttan langtíðar trygd viðvíkjandi varðveiting.

## Co-operation Between Museums & Other Institutions

Museum personnel should acknowledge and endorse the need for co-operation and consultation between institutions with similar interests and collecting practices. This is particularly so with institutes of higher education and certain public utilities where research may generate important collections for which there is no long-term security.

## 4. Søvn veita møguleikar fyri at viðurkenna, fata og stuðla náttúru- og mentanaararv

*Grundregla:* *Søvn hava eina týðandi uppgávu at menna miðlan og draga at sær breiðan skara av vitjandi úr samfelagnum, staðnum ella fólkabólkunum, ið tey tæna. Samspælið við samfelagið og miðlanin av arvi tess er ein høvuðstáttur í útbúgvingarliga leikluti savnsins.*

### MIÐLAN OG FRAMSÝNING

4.1 **Framsýningar og serligt virksemi**
Eitt og hvørt slag av framsýning, fysisk ella elektronisk, eigur at vera í samsvari við endamál, strategi og uppgávur savnsins. Framsýningarnar eiga hvørki at slaka upp á dygd ella rætt viðlíkahald og konservering av samlingunum.

4.2 **Tulking av framsýndum lutum**
Søvn eiga at tryggja, at upplýsingar, sum tey sýna í framsýningum, eru væl grundaðar og rættar og at tær sýna hóskandi fyrilit fyri umboðaðum fólkabólkum ella trúaruppfatanum.

4.3 **Framsýning av viðbreknum tilfari**
Framsýning av menniskjaleivdum og tilfari, ið hevur átrúnaðarligan týdning, eigur at vera í samsvari við professionellar standardar og við fyriliti fyri áhugamálum og trúgv hjá limum í tí samfelagnum, etnisku ella átrúnaðarligu bólkunum, haðani lutirnir koma, um teir eru kendir. Tey eiga at verða lýst siðiliga og í størstu virðing fyri tí tign, sum øll fólk hava.

4.4 **Burturtøka av tilfari úr eini framsýning**
Áheitanir frá upprunastaðnum um at taka

## 4. Museums provide opportunities for the appreciation, understanding and promotion of the natural and cultural heritage

***Principle:*** *Museums have an important duty to develop their educational role and attract wider audiences from the community, locality, or group they serve. Interaction with the constituent community and promotion of their heritage is an integral part of the educational role of the museum.*

### DISPLAY & EXHIBITION

4.1 **Displays, Exhibitions and Special Activities**
Displays and temporary exhibitions, physical or electronic, should be in accordance with the stated mission, policy and purpose of the museum. They should not compromise either the quality or the proper care and conservation of the collections.

4.2 **Interpretation of Exhibits**
Museums should ensure that the information they present in displays and exhibitions is well-founded, accurate and gives appropriate consideration to represented groups or beliefs.

4.3 **Exhibition of Sensitive Materials**
Human remains and materials of sacred significance must be displayed in a manner consistent with professional standards and, where known, taking into account the interests and beliefs of members of the community, ethnic or religious groups from whom the objects originated. They must be presented with great tact and respect for the feelings of human dignity held by all peoples.

4.4 **Removal from Public Display**
Requests for removal from public display of

framsýndar menniskjaleivdir ella tilfar, ið hevur átrúnaðarligan týdning, burtur úr framsýningum skulu viðgerast skjótt og við virðing. Áheitanir um afturbering av tilíkum tilfari skulu viðgerast samsvarandi. Leiðreglur savnins eiga greitt lýsa mannagongdir í sambandi við hetta slagið av áheitanum.

human remains or material of sacred significance from the originating communities must be addressed expeditiously with respect and sensitivity. Requests for the return of such material should be addressed similarly. Museum policies should clearly define the process for responding to such requests.

4.5 **Framsýning av upprunaleysum tilfari**

Søvn eiga at bera seg undan at framsýna ella á annan hátt nýta tilfar við ivasomum uppruna ella vantandi uppruna. Tey eiga at geva gætur, at tilík framsýning ella nýtsla kann fatast sum góðkenning ella eggjan til ólógligan handil við mentanarlutum.

**Display of Unprovenanced Material**

Museums should avoid displaying or otherwise using material of questionable origin or lacking provenance. They should be aware that such displays or usage can be seen to condone and contribute to the illicit trade in cultural property.

## ONNUR TILFEINGI

4.6 **Útgáva**

Allar upplýsingar, sum søvn almannakunngera, eiga at vera væl grundaðar, rættar og sýna ábyrgdarfult fyrilit fyri akademiskum fakum, samfeløgum ella trúarstevnum, sum verða løgd fram. Útgávur hjá søvnum eiga ikki at slaka upp á standardar savnsins.

## OTHER RESOURCES

**Publication**

Information published by museums, by whatever means, should be well-founded, accurate and give responsible consideration to the academic disciplines, societies, or beliefs presented. Museum publications should not compromise the standards of the institution.

4.7 **Eftirgerðir**

Søvn eiga at virða integritetin hjá upprunalutinum, tá eftirgerðir, endurframleiðsla ella avrit av lutum í samlingunum verða gjørdar. Øll tilík avrit eiga at vera varandi merkt.

**Reproductions**

Museums should respect the integrity of the original when replicas, reproductions, or copies of items in the collection are made. All such copies should be permanently marked as facsimiles.

## 5. Søvn hava tilfeingi, sum skapa møguleikar fyri øðrum almennum tænastum og veitingum

**_Grundregla:_** *Søvn nýta nógv sløg av servitan, førleikum og útgerð, sum hava væl breiðari nýtslumøguleikar enn á savninum. Hetta kann hava við sær býti av tilfeingi ella tænastuveitingar í framhaldi av virksemi savnsins. Hesar eiga at verða skipaðar á tílíkan hátt, at tær ikki stríða ímóti endamáli savnsins.*

## Museums hold resources that provide opportunities for other public services and benefits

**_Principle:_** *Principle Museums utilise a wide variety of specialisms, skills and physical resources that have a far broader application than in the museum. This may lead to shared resources or the provision of services as an extension of the museum's activities. These should be organised in such a way that they do not compromise the museum's stated mission.*

### EYÐMERKINGARTÆNASTUR

**5.1 Eyðmerking av lutum í ólógligum handli**

Um søvn veita hjálp til eyðmerking, eiga tey ikki á nakran hátt at geva orsøk til illgruna um, at tey beinleiðis ella óbeinleiðis fáa fyrimunir av hesum virksemi. Eyðmerking og váttan um rættleika hjá lutum, sum metast at vera ólógliga ella órættvíst útvegaðir, avhendaðir, innfluttir ella útfluttir, eigur ikki at verða almannagjørd, fyrr enn viðkomandi myndugleikar hava fingið fráboðan.

### IDENTIFICATION SERVICES

**Identification of Illegally or Illicitly Acquired Objects**

Where museums provide an identification service, they should not act in any way that could be regarded as benefiting from such activity, directly or indirectly. The identification and authentication of objects that are believed or suspected to have been illegally or illicitly acquired, transferred, imported or exported, should not be made public until the appropriate authorities have been notified.

**5.2 Rættleikaváttan og virðismeting**

Virðismetingar kunnu gerast í sambandi við trygging av samlingum. Váttanir um peningaliga virðið hjá øðrum lutum eiga einans at verða givnar eftir almenna áheitan frá øðrum søvnum ella løgfrøðiligum, stjórnarligum ella øðrum ábyrgdarhavandi almennum myndugleikum. Um savnið sjálvt er móttakari, kann meting verða gjørd av óheftum serfrøðingi.

**Authentication and Valuation (Appraisal)**

Valuations may be made for the purposes of insurance of museum collections. Opinions on the monetary value of other objects should only be given on official request from other museums or competent legal, governmental or other responsible public authorities. However, when the museum itself may be the beneficiary, appraisal of an object or specimen must be undertaken independently.

## 6. Søvn hava tætt samstarv við samfeløgini, haðani samlingar teirra stava, eins og við samfeløgini, sum tey tæna

## Museums work in close collaboration with the communities from which their collections originate as well as those they serve

***Grundregla:*** *Savnssamlingar avspegla náttúru- og mentanararvin í samfeløgunum, haðani tær stava. Av tí sama hava tær serligan týdning og eru tætt knýttar at nationalum, regionalum, lokalum, etniskum, átrúnaðarligum ella politiskum samleika. Tað hevur tí týdning, at leiðreglur savnsins sýna hesum viðurskiftum fyrilit.*

***Principle:*** *Museum collections reflect the cultural and natural heritage of the communities from which they have been derived. As such they have a character beyond that of ordinary property which may include strong affinities with national, regional, local, ethnic, religious or political identity. It is important therefore that museum policy is responsive to this possibility.*

### UPPRUNI HJÁ SAMLINGUM

### ORIGIN OF COLLECTIONS

6.1 **Samstarv**

Søvn eiga at stuðla býti av vitan, skjalfesting og samlingum við søvn og mentanarligar felagsskapir í londum og samfeløgum, har samlingar hava sín uppruna. Kannað eigur at verða, um møguleikar eru fyri at menna samstarv við søvn í londum ella økjum, sum hava mist ein munandi part av náttúru- ella mentanararvi sínum.

**Co-operation**

Museums should promote the sharing of knowledge, documentation and collections with museums and cultural organisations in the countries and communities of origin. The possibility of developing partnerships with museums in countries or areas that have lost a significant part of their heritage should be explored.

6.2 **Heimvending av mentanarligari ogn**

Søvn eiga at vera fyrireikað upp á sjálv at taka upp samskifti um afturbering av mentanarligari ogn til lond ella fólk, har ognin hevur sín uppruna. Hetta eigur at verða gjørt á ein ópartískan hátt og vera grundað á vísindaligar, professionellar og humaniterar grundreglur eins og á viðkomandi lokala, nationala og altjóða lóggávu, heldur enn at vera eitt mál á stjórnarligum ella politiskum stigi.

**Return of Cultural Property**

Museums should be prepared to initiate dialogues for the return of cultural property to a country or people of origin. This should be undertaken in an impartial manner, based on scientific, professional and humanitarian principles as well as applicable local, national and international legislation, in preference to action at a governmental or political level.

6.3 **Afturbering av mentanarligari ogn**

Tá ið eitt upprunaland ella upprunafólk biður

**Restitution of Cultural Property**

When a country or people of origin seeks the

um at fáa afturført lutir, sløg ella sýni, sum ávísast kann eru avhendaðir í stríð við grundreglur í internationalum og nationalum samtyktum og sum sjónliga eru ein partur av hesum landsins ella fólksins náttúru- og mentanararvi, eigur viðkomandi savn, um tað løgfrøðiliga kann gera tað, straks at taka neyðug stig til samstarv um afturbering.

restitution of an object or specimen that can be demonstrated to have been exported or otherwise transferred in violation of the principles of international and national conventions, and shown to be part of that country's or people's cultural or natural heritage, the museum concerned should, if legally free to do so, take prompt and responsible steps to cooperate in its return.

6.4 **Mentanarlutir úr hertiknum londum**

Søvn eiga at halda seg frá at keypa ella taka ímóti mentanarlutum úr einum hertiknum øki og virða til fulnar allar lógir og samtyktir, sum skipa innflutning, útflutning og avhending av náttúru- og mentanarvi.

**Cultural Objects From an Occupied Country**

Museums should abstain from purchasing or acquiring cultural objects from an occupied territory and respect fully all laws and conventions that regulate the import, export and transfer of cultural or natural materials.

## UMHUGSNI FYRI SAMFELAGNUM, IÐ VERÐUR TÆNT

## RESPECT FOR COMMUNITIES SERVED

6.5 **Samtíðar samfeløg**

Um savnsins virksemi umfatar eitt nútíðar samfelag ella mentanararv tess, eigur útvegan einans at verða gjørd við støði í samtykt frá og í fatan fyri ánara ella heimildarfólki. Virðing fyri ynskjum hjá samfelagnum, sum virksemið umfatar, eigur at hava avgerandi týdning.

**Contemporary Communities**

Where museum activities involve a contemporary community or its heritage, acquisitions should only be made based on informed and mutual consent without exploitation of the owner or informants. Respect for the wishes of the community involved should be paramount.

6.6 **Fígging av virksemi viðvíkjandi nútíðar samfeløgum**

Tá ið søkt verður um stuðul til virksemi, sum umfatar nútíðar samfeløg, má ikki slakast upp á áhugamál teirra. (Sí 1.10).

**Funding of Community Facilities**

When seeking funds for activities involving contemporary communities, their interests should not be compromised. (See 1.10).

6.7 **Nýtsla av samlingum frá nútíðar samfeløgum**

Nýtsla av samlingum frá nútíðar samfeløgum krevur virðing fyri menniskjansligari tign og traditiónum og mentanum, har samlingarnar verða nýttar. Tílíkar samlingar eiga at verða nýttar til at fremja menniskjaliga vælferð, sosiala menning, tolsemi og virðing við at tala fyri fleirsosialum, fleiretniskum og fleirmálsligum úttrykkum. (Sí 4.3).

**Use of Collections from Contemporary Communities**

Museum usage of collections from contemporary communities requires respect for human dignity and the traditions and cultures that use such material. Such collections should be used to promote human well-being, social development, tolerance, and respect by advocating multisocial, multicultural and multilingual expression. (See 4.3).

**6.8** **Stuðulsfeløg í samfelagnum**

Søvn eiga at skapa lagaligar umstøður fyri møguligum stuðli frá samfelagnum uttanum (t.d. vinafeløgum og líknandi stuðulsfeløgum), gáa um virði teirra og virka fyri friðsomum viðurskiftum millum samfelagið og starvsfólk savnsins.

**Supporting Organisations in the Community**

Museums should create a favourable environment for community support (e.g., Friends of Museums and other supporting organisations), recognise their contribution and promote a harmonious relationship between the community and museum personnel.

## 7. Søvn virka á lógligan hátt

**_Grundregla:_** *Søvn skulu í øllum viðurskiftum fylgja internationalari, regionalari, nationalari og lokalari lóggávu og sáttmálum. Harumframt eigur stýrið at halda allar løgfrøðiliga bindandi avtalur og treytir, sum viðvíkja savninum, samlingum og virksemi tess.*

### LØGFRØÐILIGIR KARMAR

**7.1 National og lokal lóggáva**
Søvn skulu halda allar lógir og reglugerðir og virða lóggávu í øðrum londum, sum er viðkomandi fyri virksemi teirra.

**7.2 Altjóða sáttmálar**
Leiðreglur hjá søvnum eiga at viðurkenna hesar internationalu sáttmálar, sum eru grundarlag undir museumsetisku reglunum hjá ICOM:

- UNESCO samtykt til vernd av mentanarligum virðum í sambandi við vápnað stríð. (Haag konventiónin, fyrsta protokoll, 1954 og onnur protokoll, 1999).
- UNESCO samtykt um hættir at forbjóða og forða ólógligum innflutningi, útflutningi og ognaravhendan av mentanarlutum (1970).
- Samtykt um altjóða handil við hóttum villum djórum og plantum (Washington, 1973).
- ST samtykt um lívfrøðiligt margfeldi (1992).
- UNIDROIT samtykt um stolnar og ólógliga útfluttar mentanarlutir (1995).
- UNESCO samtykt um vernd av undirsjóvar mentanararvi (2001).
- UNESCO samtykt til vernd av

## Museums operate in a legal manner

**_Principle:_** *Museums must conform fully to international, regional, national, or local legislation and treaty obligations. In addition, the governing body should comply with any legally binding trusts or conditions relating to any aspect of the museum, its collections and operations.*

### LEGAL FRAMEWORK

**7.1 National and Local Legislation.**
Museums should conform to all national and local laws and respect the legislation of other states as they affect their operation.

**7.2 International Legislation**
Museum policy should acknowledge the following international legislation which is taken as a standard in interpreting the ICOM Code of Ethics:

- UNESCO Convention for the Protection of Cultural Property in the Event of Armed Conflict (The Hague Convention, First Protocol, 1954 and Second Protocol, 1999);
- UNESCO Convention on the Means of Prohibiting and Preventing the Illicit Import, Export and Transfer of Ownership of Cultural Property (1970);
- Convention on International Trade in Endangered Species of Wild Fauna and Flora (1973);
- UN Convention on Biological Diversity (1992);
- Unidroit Convention on Stolen and Illegally Exported Cultural Objects (1995);
- UNESCO Convention on the protection of the Underwater Cultural Heritage (2001);
- UNESCO Convention for the Safeguarding

| | |
|---|---|
| immateriellum mentanarvi (2003). | of the Intangible Cultural Heritage (2003). |

## 8. Søvn virka á professionellan hátt

***Grundregla:** Starvsfólk á søvnum eiga at halda viðurkendar standardar og lógir og varðveita tignina og virðingina fyri sínum yrki. Tey eiga at verja almenningin móti ólógligum ella óetiskum professionellum framferðarhátti. Við eitt og hvørt høvi eigur almenningurin at verða upplýstur um endamálið við savnsarbeiðinum og uppgávum tess, soleiðis at ein betri almenn fatan fæst um tað, sum søvnini veita samfelagnum.*

## Museums operate in a professional manner

***Principle:** Members of the museum profession should observe accepted standards and laws and uphold the dignity and honour of their profession. They should safeguard the public against illegal or unethical professional conduct. Every opportunity should be used to inform and educate the public about the aims, purposes, and aspirations of the profession to develop a better public understanding of the contributions of museums to society.*

### PROFESSIONELLUR FRAMFERÐARHÁTTUR

8.1 **Kunnleiki til viðkomandi lóggávu**
Øll starvsfólk á søvnum eiga at hava neyvan kunnleika til viðkomandi internationala, nationala og lokala lóggávu og umstøðurnar rundan um sína setan. Tey eiga at koma sær undan støðum, sum kunnu uppfatast sum óhóskandi atferð.

8.2 **Professionel ábyrgd**
Starvsfólk á søvnum hava skyldu til at fylgja leiðreglum og mannagongdum hjá stovninum, har tey eru starvsett. Tey kunnu kortini mótmæla framferðarháttum, sum verða mettir sum skaðiligir fyri savnið ella museumsstarvið og tann professionella etikkin.

8.3 **Professionel atferð**
Trúskapur mótvegis starvsfeløgunum og savninum eru ein týðandi professionel ábyrgd, sum byggir á grundleggjandi etiskar grundreglur fyri museumsyrkið sum heild. Øll

### PROFESSIONAL CONDUCT

8.1 **Familiarity with Relevant Legislation**
Every member of the museum profession should be conversant with relevant international, national and local legislation and the conditions of their employment. They should avoid situations that could be construed as improper conduct.

8.2 **Professional Responsibility**
Members of the museum profession have an obligation to follow the policies and procedures of their employing institution. However, they may properly object to practices that are perceived to be damaging to a museum or the profession and matters of professional ethics.

8.3 **Professional Conduct**
Loyalty to colleagues and to the employing museum is an important professional responsibility and must be based on allegiance to fundamental ethical principles applicable to

eiga at liva eftir etisku reglunum hjá ICOM og vera umhugsin í sambandi við aðrar viðkomandi reglur.

the profession as a whole. They should comply with the terms of the ICOM Code of Ethics and be aware of any other codes or policies relevant to museum work.

**8.4 Akademisk og vísindalig ábyrgd**

Starvsfólk á søvnum eiga at fremja ta gransking, varðveiting og miðlan, sum samlingarnar geva møguleikar fyri. Tey eiga tí at halda seg frá einum og hvørjum virksemi, sum kann føra til, at akademisk og vísindalig vitan, sum er upparbeidd, verður mist.

**Academic and Scientific Responsibilities**

Members of the museum profession should promote the investigation, preservation, and use of information inherent in the collections. They should, therefore, refrain from any activity or circumstance that might result in the loss of such academic and scientific data.

**8.5 Ólógligur handil**

Starvsfólk á søvnum eiga ikki at stuðla ólógligum handli við náttúru- og mentanararvi, hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis.

**The Illicit Market**

Members of the museum profession should not support the illicit traffic or market in natural and cultural property, directly or indirectly.

**8.6 Trúnaður**

Starvsfólk á søvnum skulu verja trúnaðarupplýsingar, sum tey fáa lut í gjøgnum starv sítt. Harumframt eru upplýsingar um lutir, sum savnið hevur fingið til eyðmerking, í trúnaði og eiga ikki at verða almannagjørdar ella latnar víðari til nakran annan stovn ella persón uttan serligt loyvi frá ánaranum.

**Confidentiality**

Members of the museum profession must protect confidential information obtained during their work. In addition, information about items brought to the museum for identification is confidential and should not be published or passed to any other institution or person without specific authorisation from the owner.

**8.7 Trygd á søvnum og í samlingum**

Upplýsingar um trygdarskipanir savnsins eru í strongum trúnaði. Tað sama er galdandi fyri privatar samlingar og líknandi, sum savnsstarvsfólk vitja embætis vegna.

**Museum and Collection Security**

Information about the security of the museum or of private collections and locations visited during official duties must be held in strict confidence by museum personnel.

**8.8 Undantøk frá tagnarskylduni**

Tagnarskyldan skal víkja fyri skylduni at hjálpa løgreglu ella øðrum myndugleika við eftirkanning av ogn, sum er stolin, ólógliga útvegað ella ólógliga avhendað.

**Exception to the Obligation for Confidentiality**

Confidentiality is subject to a legal obligation to assist the police or other proper authorities in investigating possible stolen, illicitly acquired, or illegally transferred property.

**8.9 Persónligt sjálvræði**

Hóast starvsfólk á søvnum í ávísan mun hava rætt til persónligt sjálvræði, skulu tey viðurkenna, at eingi privat handilslig ella faklig áhugamál kunnu haldast heilt

**Personal Independence**

While members of a profession are entitled to a measure of personal independence, they must realise that no private business or professional interest can be wholly separated from their

sundurskild frá savninum, tey arbeiða fyri.

employing institution.

8.10 **Yrkislig sambond**

Starvsfólk á søvnum hava yrkislig sambond við nógvar aðrar persónar á og uttan fyri savnið, har tey starvast. Væntað verður av teimum, at tey eisini veita teimum dygdargóða professionella tænastu.

**Professional Relationships**

Members of the museums profession form working relationships with numerous other persons within and outside the museum in which they are employed. They are expected to render their professional services to others efficiently and to a high standard.

8.11 **Professionell ráðleiting**

Tað er ein professionel skylda at leita sær ráð hjá starvsfeløgum uttan fyri savnið, um savnsins egni serkunnleiki ikki er nøktandi fyri at tryggja haldgott avgerðargrundarlag.

**Professional Consultation**

It is a professional responsibility to consult other colleagues within or outside the museum when the expertise available is insufficient in the museum to ensure good decision-making.

## ÓSAMBÆRILIG ÁHUGTAMÁL

## CONFLICTS OF INTEREST

8.12 **Gávur, tænastur, lán og onnur persónlig lunnindi**

Starvsfólk á søvnum mugu ikki taka ímóti gávum, tænastum, lánum og øðrum persónligum lunnindum, sum tey fáa boðið í sambandi við sítt tænastuliga virksemi fyri savnið. Tað finnast kortini føri, har tað í professionellum høpi er høviligt at geva og taka ímóti gávum; men hetta eigur altíð at verða gjørt í navni stovnsins.

**Gifts, Favours, Loans, or Other Personal Benefits**

Museum employees must not accept gifts, favours, loans, or other personal benefits that may be offered to them in connection with their duties for the museum. Occasionally professional courtesy may include the giving and receiving of gifts but this should always take place in the name of the institution concerned.

8.13 **Eksternar setanir ella handilslig áhugamál**

Hóast starvsfólk á søvnum í ávísan mun hava rætt til persónligt sjálvræði, skulu tey viðurkenna, at eingi privat handilslig ella faklig áhugamál kunnu haldast heilt sundurskild frá savninum, sum tey arbeiða fyri. Tey eiga tí ikki at átaka sær goldið arbeiði ella røkja størv, sum kunnu vera í stríð við áhugamál savnsins.

**Outside Employment or Business Interests**

Members of the museum profession, although entitled to a measure of personal independence, must realise that no private business or professional interest can be wholly separated from their employing institution. They should not undertake other paid employment or accept outside commissions that are in conflict with, or may be viewed as being in conflict with the interests of the museum.

8.14 **Handil við náttúru- og mentanararvi**

Starvsfólk á søvnum eiga ikki at luttaka í handli (keyp ella sølu við vinningi fyri eyga) við náttúru- ella mentanararvi, hvørki

**Dealing in Natural or Cultural Heritage**

Members of the museum profession should not participate directly or indirectly in dealing (buying or selling for profit), in the natural or

beinleiðis ella óbeinleiðis.

cultural heritage.

**8.15 Sambond við handlandi**

Starvsfólk á søvnum eiga ikki at taka ímóti gávum, gestablídni ella øðrum sløgum av samsýning frá einum handlandi, auktiónshúsi ella øðrum, sum tileggjan til at keypa ella selja savnslutir, ella lata vera við at handla professionelt. Harumframt eiga starvsfólk á søvnum ikki at viðmæla ein ávísan handlandi, eitt auktiónshús ella ein metingarmann til almenningin.

**Interaction with Dealers**

Museum professionals should not accept any gift, hospitality, or any form of reward from a dealer, auctioneer, or other person as an inducement to purchase or dispose of museum items, or to take or refrain from taking official action. Furthermore, a museum professional should not recommend a particular dealer, auctioneer, or appraiser to a member of the public.

**8.16 Privat samlaravirksemi**

Starvsfólk á søvnum eiga ikki at kappast við stovnin, hvørki í sambandi við útvegan av lutum ella annað innsavningarvirksemi. Ein avtala millum starvsfólkið og stýrið viðvíkjandi privatum samlaravirksemi eigur at verða skrivað og vandaliga fylgd.

**Private Collecting**

Members of the museum profession should not compete with their institution either in the acquisition of objects or in any personal collecting activity. An agreement between the museum professional and the governing body concerning any private collecting must be formulated and scrupulously followed.

**8.17 Nýtsla av navni og logo hjá ICOM**

Navnið "International Council of Museums", styttingin ICOM ella búmerki tess, má ikki verða nýtt til at marknaðarføra ella stuðla nøkrum inntøkugevandi virksemi ella framleiðslu.

**Use of the Name and Logo of ICOM**

The name of the organisation, its acronym or its logo may not be used to promote or endorse any for-profit operation or product.

**8.18 Onnur ósambærilig áhugamál**

Um nakað annað áhugastríðsmál skuldi ment seg millum starvsfólk og savn, eiga áhugamálini hjá savninum at hava forrættindi.

**Other Conflicts of Interest**

Should any other conflict of interest develop between an individual and the museum, the interests of the museum should prevail.